TRYGD

## Biltrygd

# Trygd til tín og tín bil




Trygd hugsar um teg

# Einfalt og lætt at velja

Biltrygd er ein einføld trygging, sum ger tað lætt hjá tær at velja, hvussu tín bilur skal tryggjast. Ábyrgdartryggingin er lógarkravd, og skal hon teknast til allar bilar. Skrokktrygd fevnir um flestu skaðar á tín bil. Hevur tú ein eldri bil, kann tað vera skilabetri at tekna Partvísa skrokktrygging, sum dekkar nakrar útvaldar skaðar.



## 3 møguleikar








### Ábyrgd

Ábyrgdartryggingin fevnir um øll tey ferðandi og skaðar, sum tín bilur ger á onnur akfør.

Íroknað ábyrgdartryggingini hjá Trygd er ein Føraratrygging, sum tryggjar føraran á tínum bili serliga væl. Hjá Trygd fær førarin endurgjald og aðra hjálp í sambandi við óhapp, sum ongin annar kann ábyrgjast fyri.

### Partvís skrokk

Partvís skrokktrygging er ein avmarkað skrokktrygging, sum dekkar nakrar útvaldar skaðaorsøkir á bilin – m.a skaðar á bilrút, spegl, stuldur av bilinum ella raðherverk. Hetta er ein trygging, sum hóskar best til tín, ið hevur ein eldri bil, tí hendan trygging fevnir t.d. ikki um skaðar á egnan bil í samanstoyti, tá tú hevur ábyrgdina fyri skaðanum.

### Skrokk

Skrokktryggingin fevnir um flestu skaðar á egnan bil. Tú sleppur sostatt undan einum størri fíggjarligum smeiti í sambandi við flestu skaðar. Hevur tú lán í bilinum, krevja veðhavarar vanliga, at bilurin er skrokktryggjaður.



### Kreppuhjálp er altíð íroknað

Sama hvat fyri trygging tú hevur valt, fevnir tryggingin altíð um sálarliga kreppuhjálp í sambandi við ávísar skaðar. Treytað av læknaváttan kann tryggingin veita endurgjald fyri kreppuhjálp til tey tryggjaðu.

## Ískoytistryggingar

Øll hava ikki sama tørv á trygging til bilin. Tí ber til at knýta nakrar ískoytistryggingar afturat Biltrygd. Harvið rindar tú bert fyri tað, ið tú hevur tørv á.

### Bilhjálp við leigubili

Hevur tú valt ískoytisfulnaðin Bilhjálp við leigubili hevur tú møguleika fyri at fáa leigubil í sambandi við mekaniska umvæling av tryggjaða bilinum. Hevur tú Skrokk- ella Partvísu skrokktryggingina, so er eisini møguligt at fáa leigubil í sambandi umvæling av øllum skaðum, sum tryggingin fevnir um.

Bilhjálp fevnir eisini um nærum alla hjálp til bilin sum t.d. útreiðslur til kranabil, tænastubil og starthjálp í samband við óhapp, motorsteðg ella líknandi. Hetta er galdandi fyri tann tryggjaða bilin og tann íbundna húsvognin ella teltvognin.

Bilhjálp er galdandi í Føroyum og uttanlands.

Í Føroyum er tað Skaðatænastan hjá Trygd, sum hjálpir, soleiðis at tú skjótast til ber fært ta hjálp, tú hevur brúk fyri.

Ert tú uttanlands, er tað Falck í Danmark, ið taka sær av, at tú eisini fært hjálp í øllum Europa.

### Parkeringstrygging

Hevur tú teknað Skrokktrygging, kanst tú velja ískoytistryggingina Parkeringstrygging. Við hesi trygging hevur tú onga sjálvsábyrgd fyri ávísar skaðar, m.a. um onkur hevur rent á bilin og er rýmdur av staðnum, ella tá herverk er gjørt á bilin.

## Gjaldsmøguleikar

### Fastgjaldstrygging

Fastgjaldstrygging kann bert teknast sum samansett Ábyrgdar- og Skrokktrygging. Við fastgjaldstrygging varveitur tú sama árliga tryggingargjald, hóast tú hevur skaða.

Tað eru serligar treytir galdandi fyri at fáa fastgjaldstrygging og fyri at varðveita fastgjaldstrygging. Sí hesar á heimasíðu okkara.

### Trintrygging

Hendan kann teknast fyri allar biltryggingar.

Í mun til fastgjaldstryggingina verður trintrygginin dýrari, um skaði hendir, uttan so, at onkur annar kann ábyrgdast fyri skaðan.

Tryggingin hevur fýra stig og verður bíligari annaðhvørt ár, um eingin skaði er, til tryggingin er komin á besta trinið.

### Gjald eftir egnum ynski

Tú avgerð um tryggingargjaldið skal vera ársfjórðingsgjald, hálvársgjald ella ársgjald. Tú kanst eisini melda tryggingargjaldið til Gjaldskipanina. Gjaldið verður tá goldið stundisliga, og tú sleppur undan at hugsa meira um hetta.

Vilt tú heldur sjálv/ur flyta peningin, ber eisini til at gjalda við inngjaldskorti ella gjøgnum netbanka hjá peningastovnunum.

*Grundarlagið fyri gjaldinum á biltryggini er eginvekt og aldur á bilinum, umframt aldur og skaðagongdin hjá føraranum, sum vanliga brúkar bilin. Virðið á bilum fellur við aldrinum, og tískil lækkar tryggingargjaldið eisini, so hvørt sum bilurin eldist. Tryggingargjaldið lækkar 2. hvørt ár frá fyrsta skrásetingardegi, fram til bilurin verður 6 ár.*

# Tríggir møguleikar til tín bil

| | Ábyrgd (Lógarkravd) | Partvís skrokk (Nýtt í Føroyum) | Skrokk |
|---|---|---|---|
| Skaðar, sum tín bilur ger á aðrar bilar, fólk ella lutir | ✓ | ✓ | ✓ |
| Skaðar á ferðafólk í bilinum | ✓ | ✓ | ✓ |
| Nógv betri trygging til føraran — Bert hjá Trygd | ✓ | ✓ | ✓ |
| Sálarlig kreppuhjálp — Bert hjá Trygd | ✓ | ✓ | ✓ |
| Skrokkskaðar á tín bil, sum tú sjálvur hevur ábyrgdina av | ✗ | ✗ | ✓ |
| Skaðar á rútar, spegl og lyktir á tínum bili, umframt skaðar av stuldri og raðherverki | ✗ | ✓ | ✓ |
| **Ískoytistryggingar** | | | |
| Bilhjálp íroknað leigubil, eisini í sambandi við mekaniskar umvælingar — Bert hjá Trygd | ✓ | ✓ | ✓ |
| Parkeringstrygging — Bert hjá Trygd | ✗ | ✗ | ✓ |

✓ merkir umfatað av tryggingini
✗ merkir ikki umfatað av tryggingini

## Skifta til Trygd? Vit hjálpa tær!

Ynskir tú at tekna Biltrygd, men hevur trygging í øðrum felag, avgreiða vit alt í sambandi við skiftið fyri teg. Tú ert altíð vælkomin at støkka inn á gólvið hjá Trygd ella BankNordik, um tú ynskir at fáa meira at vita um Biltrygd.

Vit vegleiða og svara fegin spurningum um røttu biltryggingina fyri teg og tíni.

*Hetta er ikki ein fullfíggjað lýsing av Biltrygd hjá Trygd. Víst verður til www.trygd.fo, har tryggingartreytirnar fyri Biltrygd kunnu lesast.*

**P/F Trygd**
**Tryggingarfelag**

Oknarvegur 5
P.O. Box 44
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 358 100
Fax +298 317 211
trygd@trygd.fo
www.trygd.fo

**www.trygd.fo**

SENDISTOVAN